

MYND: JENS KRISTIAN VANG

*– Aftaná at hava mist tveir abbasynir soleiðis, er neyðugt at koma víðari við lívinum skjótast gjørligt, sigur Sólvit Simonsen av Sandi*

og glaður drongur. Ongantíð hoyrdu vit hann tala øvugt orð. Hann tagdi heldur, táið kanska flestu onnur høvdu glett á tonn«.

Hetta var, sum vera man, eitt øgiligt bakkast fyri familjuna, men lívið mátti livast víðari, bæði við sorgini og sakninum. Tey royndu at finna gerandisdagin aftur: Sólvit fór umborð aftur á strandfaraskipið "Sildberan", konan í krambúðina, og nakað seinni fór pápin aftur umborð á sín bát.

Lítið grunaðu tey tá, at minni enn fýra mánaðir seinni skuldu tey aftur standa í somu støðu!

## Við høvdinum í ein brunn

Summarið gekk og nú var komið út í september mánað, og enn eitt heyst stóð fyri durum. Álmannakkin vísir 22. september og tað er sunnumorgun. Sólvit, ið er ein av trimum deknum við Sands kirkju hevði gingið sær ein túr, áðrenn hann fór í kirkju.

Tá hendi tað, at kirkjuhurðin gongur og kona Jákup Birgir Mohr, fulltrúa á sýslumansskrivstovuni kemur til Sólvit og spyr, hvar maðurin situr í kirkjuni. Hann visti ikki, hvat var áfatt, men vísti so henni á sess hansara.

– Løtu seinni gongur hurðin á øðrum sinni, og tá kemur ein annar maður – Hans Falkvard – innar, og gongur beint ímóti mær. Nú skilti eg, at okkurt var galið, og spurdi eg hann, hvat var áfatt?

Versonurin, Emil hevði verið á vitjan um morgunin, og Sólvit hugsaði beinanvegin at okkurt var hent honum á leiðini heimaftur til Dals. Hann spurdi tí beinanvegin, um tað var Emil. Nei, tað var Kristian sum var dottin eftir høvdinum niður í ein brunn. Beint nú stríddust tey við at fáa lív í hann aftur, samstundis sum boð vórðu send eftir tyrlu fyri at flyta hann á Landssjúkrahúsið.

– Eg minnist væl, hvat eg segði. Eg segði: »Ja, men so má eg við til Havnar!«.

Teir báðir vóru skjótir til heimið, har øll bóru sorg í sinni, meðan onnur íðin arbeiddu við at fáa lív aftur í Kristian, sum fáar dagar seinni skuldi halda trý ára føðingardag sín.

Men har var tíverri einki at gera. Og løtu seinni kom sýslumaðurin við boygdum høvdi, sum týðiliga segði frá tí, ið hann hevði uppá hjarta: Teir fingu ikki lív aftur í Kristian. Og hann var altso deyður!

## SÓLVIT Í MINNINGARORÐUM UM ÓLAV:

**– Ólavur var ein spaklyntur, lítillátin og eygagóður drongur. Tað var so stuttligt, tá hann var á vitjan, og hann var so sera góður við systkini, sum øll trý vóru yngri enn hann. Altíð var hann klárur við eini hjálpandi hond til mammuna og pápan, t.d. at vera inni fyri tey og líknandi.**

**– Tað var tungt hjá tykkum, ítróttarfelagar, skúlafelagar og aðrir vinir, at Ólavur so knappliga bleiv tikin burtur. Hjálpi tykkum Gud at føra bæði gaman og álvara víðari. Og tú, stakkals ungdómur sum kom fyri ta tungu lagnu at koyra á Ólav. Tú fært somu heilsan sum hini.**

## Hvussu var nú veðrið?

Eins og tað var, tá Ólavur andaðist fýra mánaðir frammanundan, var faðirin, í hesum føri Evald, heldur ikki heima henda sorgardagin. Hann førdi ein danskan bát í Amerika, og tí var neyðugt at fáa samband við hann umvegis telefonina.

– Eg dugdi so illa at ringja til reiðaríið. Eg fekk tí Hans at gera tað fyri meg. Hann so gjørdi, men tað tók langa tíð til vit fræ、ttu aftur – einir tveir tímar ella so. Vit ringdu so eina ferð aftrat, fyri at siga frá, at tað hastaði. Tá fingu vit beinanvegin fatt.

– Tað bleiv so mín uppgáva, at siga honum hvat skett var. Hann svaraði beinanvegin: »Her er einki sum eitur. Eg komi heim alt fyri eitt!«. Lukkutíð vóru teir staddir beint við eina oyggj, og her varð hann so settur í land og kundi koma heim, greiðir Sólvit frá.

Nú var júst tað sama hent, sum Evald hevði óttast fyri, – at hann sjálvur skuldi missa eitt av sínum børnum.

Nakrar dagar seinni varð Kristian jarðaður. Ikki óvæntað, vóru øgiliga nógv fólk og fylgdu, hóast veðurgudarnir ikki vístu seg frá síni bestu síðu.

– Tú, tað var so løgið, at eg sjálvur sansaði als ikki, hvussu veðrið var undir jarðarferðini. Tað var ikki fyrrenn eitt ár aftaná, at vit komu at tosa um jarðarferðina og veðrið. Nei, eg fekk tað ikki við, skal eg siga tær.

Sólvit fór tí oman í kirkjuna og hugdi í dagbókina fyri kirkjuligu handlingarnar, har ein eisini skrivar hvussu veðurlíkindini eru slíkar dag. Ikki fyrren tá fann hann útav, hvussu vánaligt veðrið í roynd og veru var henda dagin. Har stóð nevniliga undir jarðarferðini: »Stormur av landsynningi og regn!«.

## Ikki inn at kúra

Eitt er at missa ein abbason eina ferð. Annað er at missa tveir abbasynir innanfyri fýra mánaðir.

Fyri Sólvit og familju hansara vóru hetta dagar í sorg og sakni, men gerandisdagurin kom so líðandi aftur.

– Eg veit ikki, – tað vísti seg sum

▶